Álit

í

løgtingsmáli nr. 43/2025: Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um skattligar avskrivingar v.m. (Avskrivingarlógin) (Broyting í avskriving av leiguíbúðum)

Bárður á Lakjuni, Beinir Johannesen, Elsebeth Mercedis Gunnleygsdóttur, Grímur Sundstein, Jacob Vestergaard og Jørgen Niclasen, tingfólk, hava vegna Fólkaflokkin lagt málið fram 4. november 2025, og eftir 1. viðgerð 7. november 2025 er tað beint Fíggjarnevndini.

Nevndin hevur viðgjørt málið á fundi 11., 24. og 26. november 2025.

Undir viðgerðini hevur nevndin havt fund við Vinnuhúsið, Bústaðir, landsstýriskvinnuna í umhvørvismálum, Margit Stórá, og landsstýriskvinnuna í fíggjarmálum, Ruth Vang.

Undir viðgerðini hevur nevndin býtt seg í ein meiriluta og ein minniluta.

Meirilutin (Eyðgunn Samuelsen, Ingilín D. Strøm, Dennis Holm og Hanna Jensen) hevur hesar viðmerkingar:

Talan er um broytingar í avskrivingarlógini. Ætlanin er at broyta treytirnar fyri avskriving viðvíkjandi íbúðarbygging til útleigu. Í dag ber til sambært lógini at avskriva við 7% um árið, tá talan er um bygningar til útleigu við minst 10 íbúðum. Lógaruppskotið lækkar hetta markið niður í minst 3 íbúðir.

Fíggjarmálaráðið hevur víst á, at avskrivingarlógin upprunaliga var ætlað til lutir og amboð, ið missa virði yvir tíð. Spurningurin um, hvørt man skuldi gera broytingar í avskrivingarlógini til tess at betra um bústaðarmarknaðin, hevur áður verið uppi at venda í Fíggjarmálaráðnum, men metingin hevur verið, at tað ikki er ein gongd leið.

Íbúðarbygningar kunnu ikki metast at fella í virði yvir tíð, heldur øvut, og m.a. tí er ikki rætt at nýta avskrivingarlógina, um man ynskir at víðka um lættan, ið longu er. Ikki verður viðmælt at víðka eina stuðulsskipan til útleigarar í avskrivingarlógini. Hetta er ein skipan, ið hættar seg soleiðis, at landið er eitt slag av rentufríum kassakreditti. Víst hevur verið á, at talan er um eina stuðulsskipan til vinnuna, sum ikki er væleydnað.

Umhvørvismálaráðið hevur víst á, at hóast grundgivið verður bústaðarpolitiskt í viðmerkingunum til uppskotið, er talan heldur um vinnupolitikk enn bústaðarpolitik. Eins og Fíggjarmálaráðið vístu tey á upprunaliga endamálið við lógini, og at bústaðarbygging í dag meir kann roknast sum ein íløga heldur enn ein útreiðsla.

Upprunaliga kom íbúðarbygging í lógina fyri at nøkta bústaðartørvin, ið tá var. Sostatt vísti Umhvørvismálaráðið eins og Fíggjarmálaráðið á, at talan er um eina stuðulsskipan, ið ikki er eydnast við endamáli sínum.

Talan er um ein stuðul til útleigarar í avskrivingarlógini, ið mann nú ynskir at víðka, og hesum mælir landsstýriskvinnan í umhvørvismálum frá. Harumframt helt landsstýriskvinnan, at av tí at lendið er avmarkað, er betri at rúma 10 ella fleiri bústøðum á einum lendi enn at byggja tríggjar íbúðir, sum annars er grundgivið við í uppskotinum.

Vinnuhúsið hevur víst á arbeiðið, sum ein arbeiðsbólkur undir Vinnuhúsinum hevur gjørt fyri at fáa fleiri bústaðir. Í tí sambandi er hetta uppskotið ein partur, tí hetta er serliga eggjandi fyri smærri fyritøkur, ið kunnu byggja smærri íbúðarbygningar. Tey hava víst á, at tað var møtimikið fyri summi at fara í holt við bygging av 10 ella fleiri íbúðum, og tí er uppskotni stuðulin kærkomin til tey, ið vilja byggja minni íbúðarbygningar til útleigu ymsastaðni kring landið.

Vinnuhúsið hevur víst á, at prísmunurin við ella uttan avskrivingarmøguleika fyri hvørja íbúð er munandi. Í løtuni metur Vinnuhúsið ikki, at nakar trupulleiki er at fáa útleigarar til tær íbúðirnar, ið verða bygdar og lýstar til leigu.

Verður stuðulsskipanin víðkað, so fáa Bústaðir sannlíkt eisini ein ávísan ágóða eins og smærri fyritøkur. Tó er sannlíkt, at Bústaðir í størri mun fara undir verkætlanir við fleiri heldur enn færri eindum.

Meirilutin viðurkennir, at tað kann vera skilagott at royna at útvega leiguíbuðir ymsastaðni kring landið, og at fleiri fyritøkur møguliga høvdu farið í gongd at bygt leiguíbuðir, so at útboðið økist. Tó ivast meirilutin í, um tað er rætt at stuðla útleigarum við at víðka ásetingarnar í avskrivingarlógini, og sera ivasamt er, um stuðulin fer at elva til fleiri og bíligari bústaðir, ið vit hava stóran tørv á.

Eitt arbeiði er í løtuni í gongd, ið fevnir um allar flokkar á tingi, har størsta avbjóðingin er at útvega fleiri bústaðir. Tá er bæði talan um at byggja nýtt, men sanniliga eisini at fáa tey túsundatals tómu húsini kring landið í brúk. Ein stuðulsskipan til tey, ið leiga, er í gerð við einum býlisstuðli.

Meirilutin mælir til, at ymisk ynski um enn fleiri stuðulsskipanir til tey, ið leiga út, afturat MVG afturberingini fyri íbúðarbygging og serliga góðum avskrivingarreglum, verður tikið upp og arbeitt víðari við í tí foruminum.

Tí tekur meirilutin ikki undir við málinum og mælir Løgtinginum frá at samtykkja uppskotið.

Minnilutin (Beinir Johannesen, Magnus Rasmussen og Steffan Klein Poulsen) hevur hesar viðmerkingar:

Uppskotið snýr seg í stuttum um, at niðara markið fyri talið av leigubústøðum, ið skulu til fyri at kunna avskriva eftir serligum reglum, verður lækkað úr 10 niður í 3.

Fyrimunurin við hesum er, at tað eru fleiri, ið fáa betri møguleika at byggja leiguíbúðir og harvið økja um útboðið av bústøðum.

Hoyringarnar hava eisini víst, at tað er til fyrimunar bæði fyri almenn og privat feløg, ið eru virkin á bústaðarmarknaðinum.

Hoyringarnar hava eisini víst, at tað hevði verið til stóran fyrimun fyri tær smærru og miðalstóru fyritøkurnar. At byggja minst 10 leiguíbúðir krevur rættiliga nógv størri kapital, enn hvat tað tildømis verður kravt, tá talan eru um 3 leiguíbúðir. Tí høvdu tað verið fleiri um boðið at økt um útboðið, um avskrivingarreglurnar blivu broyttar.

Eisini hevur verið víst á, at tað er ein fyrimunur fyri útjaðaran, serliga smærri býir og bygdir, tí har er tørvurin á størri bústaðareindum ikki tann sami, sum í miðstaðarøkinum. Eftirspurningurin er tá ikki eftir minst 10, men heldur einum minni tali av leigubústøðum. Har hevði broytingin eisini verið til fyrimunar.

Vit hava bústaðartrot í Føroyum, og kemst tað av, at útboðið hevur ikki klárað at fylgt við eftirspurninginum. Tað er ongin einføld loysn uppá alt bústaðartrotið, men átøk, ið eggja til at økja um útboðið, eru eitt stig rætta vegin. Í so máta er hetta uppskot av slíkum slag.

Við hesum viðmerkingum tekur minnilutin undir við málinum og mælir Løgtinginum til at samtykkja uppskotið.

Fíggjarnevndin, 26. november 2025

Eyðgunn Samuelsen forkvinna	Beinir Johannesen næstformaður	Ingilín D. Strøm
Dennis Holm	Hanna Jensen	Magnus Rasmussen
	Steffan Klein Poulsen	